# Nøvn

†

Kæra mostir okkara

**Ingrid Gerðisheim**
**fødd Højsted**

andaðist 1. januar á Landssjúkrahúsinum,
82 ára gomul.

Jarðarferðin verður hósdagin 6. januar
kl. 12.30 úr Hvalbiar kirkju.

***Familjunnar vegna***
**Sigrun, Maud, Ingun, Nita og Magnar**

## TØKK

Í sambandi við at jarðarferðina
hjá mammubeiggja okkara

**Hans Mortensen**
**Famjin**

takka vit øllum, sum fylgdu honum til jarðar.
Ein serstøk tøkk til starvsfólkið
á Eldrasambýlinum á Tvøroyri fyri
teirra stóru umsorgan ta tíð, hann búði har.

**Poul, Óli, Ebba og Edda**




## Takk

Vit vilja fegin takka øllum tykkum, ið gjørdu diamantbrúdleypdag okkara tann 9. des. 2010 so góðan og minnisríkan.Takk fyri gávur og heilsanir. Takk til tykkum mongu, sum møttu upp, og tøkk til tykkum mongu, ið hjálpti til á ymiskan hátt. Somuleiðis vilja vit ynskja tykkum øllum eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

**Hilda og Allon**

# Við deyða Johannis Holm Jacobsens

## f. 30. oktober 1924 – d. 20. december 2010

*Í morgun niðri við Jordan*
*á áarbakkanum har*
*stóð slitin vallarastavur,*
*títt fingramerki bar.*

*Tey veittraðu hinumegin,*
*og vallarin fór við skund,*
*at savnast við undanfarnum*
*til ævigan fagnaðarfund.*

*Av undanfarnum fór móðir,*
*áðrenn hann fylti ár,*
*vív fór á hálvum skeiði*
*einsemi, longsul og tár.*

*Loksins eru tey saman*
*har í dýrdini inni*
*maður og vív eftir tungan sakn*
*og sonur og móðir á fyrsta sinni.*

*Ungir, á vári lívsins,*
*vit tektu hin æviga stað,*
*fóru á vallaragøtu*
*Guds lyfti í ferðalag.*

*Eg unni tær inniliga,*
*at tú hin fyrri var*
*at náða Staðin vit tektu,*
*vit síggjast aftur har.*

**Dánjal**



----------------------------------------

ÁRSINS GÁVA
Føroya Myndakalendari 2011
Umbiðið kalendaran nú
og sendi hann til útheimin




Tel. 341800
Johanna Vang
johanna@sosialurin.fo